Leirvíkar bygdaráð:

# Heldur tað vera rættast at halda fast um tunnil

**- Í Leirvík verður nógv tosað um øktu ferðsluna, sum verður gjøgnum bygdina, tá ið Norðoyatunnilin letur upp. Fólk eru samd um, at tað er óheppið, at Norðoyatunnilin verður latin upp fyri ferðslu, áðrenn ferðsluviðurskiftini í Leirvík eru loyst, sigur bygdarráðsformaðurin, Sjúrður Eliasen**

SAMRØÐA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Sjúrður Eliasen er bygdaráðsformaður í Leirvíkar kommunu.*

*Mynd: Edvard Joensen*

Seinasta hóskvøld skipaði Leirvíkar bygdaráð fyri kunnandi fundi í bygdarhúsinum, har greitt varð frá, hvat hent er í málinum um ferðsluviðurskiftini í Leirvík síðan seinasta fundin av slíkum slagi.

- Vit høvdu ein almennan kunningarfund í juni í fjør, og nú vildu vit so kunna bygdafólkið um gongdina, ið verið hevur síðan hendan fundin.

Sjúrður Eliasen, bygdarráðsformaður, ásannar, at fólk í Leirvík hava rættiliga stóran áhuga fyri ferðsluviðurskiftunum í bygdini, nú alt bendir á, at Norðoyatunnilin verður liðugur, áðrenn viðurskiftini, sum kunnu standast av nógv øktari ferðslu gjøgnum Leirvíksbygd, verða loyst.

Hann sigur, at eini 200 fólk møttu til fundin hóskvøldið, og tað vóru mong, sum nýttu høvi at bera fram sína hugsan.

## Bert ein samtykt

Bygdaráðsformaðurin vísir á, at tað fyriliggur bert ein samtykt um betran av ferðsluviðurskiftunum í Leirvík í samband við Norðoyatunnilin. Hetta er løgtingslóg nr. 49, frá 10. apríl í ár um tunnil undir Leirvík.

- Í lógini stendur, at forkanningar til tunnil skulu verða gjørdar í seinasta lagi ár 2005. Síðan skal landsstýrismaðurin við vinnumálum leggja fram uppskot um at loysa ferðsluviðurskiftini í Leirvík við einum tunli.

Sjúrður vísir á, at ymisk uppskot hava verið frammi um tunnilsgerðir og vegaføringar uttan tunnil, men Leirvíkar bygdaráð var samt um at halda fast um hesa einu tunnilsætlanina longu áðrenn samtyktina í løgtinginum.

- Tvey av uppskotunum snúgva seg um tunlar, sum verða bundnir í verandi tunnil, men vit í bygdarráðnum halda, at hesi uppskot fevna um ein ov lítlan part av bygdini. Ferðslan fer í ov stóran mun at ganga ígjøgnum bygdina, áðrenn hon fer inn í tunnilin.

Bygdaráðsformaðurin sigur, at tunnilin, sum bygdaráðnum dámar best, verður einar 1200 metrar langur.

- Vit halda, at hesin leiðir ferðsluna sum frægast og sum skjótast út úr bygdini. Her sleppur ferðslan frá Norðoyatunlinum rímiliga skjótt inn í tunnilin og kemur útaftur á leiðini við Statoil-støðina.

Sjúrður sigur, at verður nýggi tunnilin í Leirvík íbundin verandi tunnil í bygdini, noyðast leirvíkingar, sum skulu til Fuglafjarðar, Gøtu, út á Skálafjørðin ella til Havnar, niðan í bygdina fyri at koyra gjøgnum nýggja tunnilin fyrst og síðan beinleiðis gjøgnum verandi tunnil.

- Hetta hóvar okkum ikki nakað serligt, og okkum dámar best skipanina, sum hon er, har koyrt verður beinleiðis í tunnilin her niðri í bygdini.

## Eitt stórmál

Sjúrður ásannar, at fólk í Leirvík eru ógvuliga misnøgd við, at ferðsluviðurskiftini í bygdini ikki verða loyst, samstundis sum Norðoyatunnilin verður bygdur.

- Hetta er eitt stórt mál fyri okkum, sum nógv verður prátað um í bygdini. Vit í bygdaráðnum duga væl at skilja, at fólk ikki eru nøgd við raðfestingina, har Norðatunnilin verður bygdur fyrst – og síðan verður hond tikin um ferðsluviðurskiftini í Leirvík.

Eingin í Leirvík ivast í, at tað fer at merkja bygdina nógv, tá ið hópur av bilum skulu koyra gjøgnum Leirvíksbygd um dagin.

- Ferðslumynstrið í Føroyum er nógv broytt á tann hátt, at tað er so nógv tung ferðsla eftir vegunum, eitt nú fiskaflutningurin, sum er millum bygdirnar og oyggjarnar, sigur Sjúrður.

Nú arbeitt verður við vegagerðini til tunnilsmunnan í Leirvík, er longu meira av tungari ferðslu í bygdini.

Tá ið Sosialurin tosaði við bygdaráðsformannin í Leirvík seinnapartin mánadagin, hevði bygdaráðið ikki viðgjørt kunnandi fundin, ið verið hevur.

- So, eg dugi ikki at siga, hvørja niðurstøðu, vit fara at gera okkum eftir henda fundin, sigur Sjúrður, sum kortini er sannførdur um, at bygdaráðið ætlar sær at halda fast um tunnilsætlanina, ið er samtykt.

## Droyma um grót

Bygdaráðsformaðurin vísir á, at ein øgilig rúgva av gróti skal koyrast frá sjálvari tunnilsgerðini, tá ið boringin og spreingingin til Norðoyatunnilin byrjar.

- Tað verður ógvuliga trongligt, um alt hetta grótið skal flytast burtur eftir bygdavegunum í Leirvík. Vit hava víst leiðsluni fyri Norðoyatunnilin á, at grótið kann leggjast úti á Kráartanga, men enn er eingin avtala gjørd um nakað. Skal grótið leggjast á Kráartanga, verður neyðugt at leggja størri grót til verju uttanfyri aftur, tí her kann verða brim, tá ið uppgangur er.

Sjúrður vísir á, at verður grótið, sum koyrt verður úr Norðoyartunlinum leirvíksmegin, lagt á Kráartanga, fær kommunan samstundis eitt ídnaðarøki burtur úr hesum.

Spurdur, um grótið, sum kemur úr Norðoyatunlinum, hevði verið eitt "plástur á sárið", nú leirvíkingar eftir øllum at døma fara at noyðast at liva við nógvari ferðslu eini 2-3 ár eftir, at tunnilin er latin upp, sigur bygdaráðsformaðurin:

- Tað dugi eg ikki at siga, og tað havi eg sum so heldur onga viðmerking til.

Sjúrður sigur, at sambært ætlanini við Norðoyatunlinum fer tað at taka umleið hálvt annað ár at spreingja hann ígjøgnum. Síðan skal hann gerast liðugur og klárur at koyra ígjøgnum.

- Hinvegin skal landsstýrismaðurin ikki fyrr enn í seinasta lagi í 2005 leggja uppskot fyri tingið um tunnilin í Leirvík. Tí vænta vit ikki, at byrjað verður uppá tunnilin her í bygdini fyrr enn í fyrsta lagi í 2006 ella 2007. Væntandi er tí, at Leirvíksbygd, soleiðis sum hon er í dag, noyðist at bera alla hesa ferðslu í nøkur ár, áðrenn hond verður tikin um ferðsluviðurskiftini her.

## Ymiskir møguleikar

Bygdaráðsformaðurin sigur, at á kunnandi fundinum í bygdahúsinum komu fram ymisk uppskot um, hvussu málið kundi verið loyst, men hann heldur, at flestu hóast alt hildu best um tunnilsloysnina, ið bygdaráðið eisini einmælt hevur samtykt.

Ein av møguleikunum, sum hevur verið frammi, er at leggja ein veg framvið sjósíðuni. Eisini hevur verið tosað um at leggja ein nýggjan veg omanfyri bygdina.

- Verður vegurin lagdur fram við sjósíðuni, renna vit okkum í alt virksemið, sum er har. Verður vegurin hinvegin lagdur omanfyri bygdina, er væntandi, at hann í framtíðini kemur at liggja í vegin fyri nýggjum útstykkingum.

Sjúrður tekur tí saman um og heldur, at hóast tað fer at taka longri tíð, áðrenn leirvíkingar fáa ein tunnil, sum loysir hesar trupulleikar, verður hetta ein loysn, sum fólk í bygdini verða fegnari um í longdini.

- Ein tunnili er dýrari, og tað fer at taka longri tíð, áðrenn hann verður veruleiki, men eg vænti eisini, at vit øll verða glaðari, tá ið hann er komin, og vit soleiðis fara at merkja minst møguligt til nógvu ferðsluna, sum fer fram við okkum, sigur Sjúrður Eliasen, bygdaráðsformaður.




*Sambært ætlanini, sum Leirvíkar kommuna heldur vera ta frægastu, kemur tunnilin útaftur við Statoil-støðina í bygdini.*
*- Okkum dámar ikki, at nýggi tunnilin verður bygdur í verandi tunnil, tí tá verður neyðugt hjá fólki, sum ætla sær av bygdini, fyrst at fara niðan í bygdina og inn í nýggja tunnilin, áðrenn sleppast kann inn í verandi tunnil, sigur Sjúrður Eliasen.*

*Mynd: Rúna Sivertsen*



*- Verður frákoyringin frá Norðoyatunlinum løgd fram við sjósíðuni, renna vit okkum í alt virksemi, sum er har, sigur Sjúrður Eliasen.*
*Í Leirvík eru neyst, bátahylur, havnaløg og nógv fiskivinna fram við sjósíðuni.*

*Mynd: Rúna Sivertsen*



*Tað var Lions Club í Eysturoy, sum tók stig til at savna kommunurnar í Eysturoy saman um eina serflutningstænastu. Ein arbeiðsbólkur hevur síðan arbeitt víðari við málinum, har Sigvald Kristiansen, lækni, hevur umboðað LC og Sæunn Ó. Hansen, býráðslimur í Runavíkar kommunu, hevur umboðað kommunurnar í oynni. - Vit eru ógvuliga fegin um, at skipanin fekst at virka júst í ár, sum er ár teirra rørslu-og menningartarnaðu, sigur Sæunn Ó. Hansen*

# Serflutningsskipan fyri rørslutarnað í Eysturoy

**Sæunn Ó. Hansen, ið hevur sitið í arbeiðsbólkinum, sum hevur smíðað skipanina, sigur, at øll tey, sum eru so rørslutarnað, at tey ikki kunnu nýta almenn flutningstól, kunnu søkja um flutningsloyvi við serflutningstænastuni hjá kommununum í Eysturoy**

SERFLUTNINGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í dag, mikudagin 1. oktober, byrjar ein serflutningsskipan í kommununum í Eysturoy at virka. Skipanin ber heitið "Serflutningsskipan Landsins", og tað var upprunaliga Lions Club í Eysturoy, sum tók stig til at savna kommunurnar í oynni saman um eina slíka skipan.

Ein arbeiðsbólkur hevur arbeitt víðari við málinum, har Sigvald Kristiansen, lækni, hevur umboðað Lions Club og Sæunn Ó. Hansen, býráðslimur í Runavíkar kommunu, hevur umboðað kommunurnar í Eysturoy.

## Ógvuliga fegin

Sæunn vísir á, at árið 2003 er ár teirra rørslu-og menningartarnaðu, og tí er tey, sum standa aftanfyri tiltakið við serflutningsskipanini, ógvuliga fegin um, at skipanin kundi fara at bakkastokki júst í ár.

- Við vælvild frá øllum kommununum í Eysturoy og ikki minst við vælvild frá landsstýrismanninum í almannamálum, Páll á Reynatúgvu, hevur eydnast okkum at fáa skipanina at virka frá 1. oktober, sigur hon.

Henda nýggja flutningsskipanin í Eysturoy verður fíggjað soleiðis, at land og kommunur rinda hvør síni 45% og brúkarin 10% av kostnaðinum.

## Ókeypis hjálparfólk

Reglur eru smíðaður sum siga, hvør kann koyra við bussinum hjá Serflutningsskipan Landsins.

Sæunn vísir á, at øll tey, sum eru so rørslutarnað, at tey ikki kunnu nýta almenn flutningstól, kunnu søkja um flutningsloyvi við serflutningstænastuni.

- Umsóknarblað um flutningsloyvi fæst við at venda sær til Almannastovuna í Saltangará. Síðan ger stovnurin í hvørjum einstøkum føri tilmæli og tekur endaliga støðu um loyvi at nýta bussin. Tá ið umsóknin er viðgjørd og avgreidd, boðar Almannastovan umsøkjaranum skrivliga frá hesum.

Sæunn sigur, at brúkarar – um neyðugt – kunnu taka hjálparfólk við sær í bussin, og tá sleppa hesi við ókeypis.

Serflutningsbussurin koyrir í vanligari arbeiðstíð, frá kl. 8.30-16.00, mánadag til fríggjadag.

Brúkarin keypir kort frá bussføraranum móti kvittan, og prísirnir eru hesir: 5-ferðakort (kr. 50), 10-ferðakort (kr. 90) og 20-ferðakort (kr. 160).

## Sum hýruvognur

Sæunn Ó. Hansen sigur, at um kvøldarnar og í vikuskiftinum kann bussurin verða nýttur sum hýruvognur hjá brekaðum.

- Gjaldið fyri hesar túrar er sum fyri vanligan hýruvogn, og túrar eftir arbeiðstíð skulu verða bílagdir fyri kl. 16. Túrar, sum koyrast skulu í vikuskiftinum, mugu bíleggjast fyri kl. 15.30 fríggjadag, sigur hon at enda.

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um bussin hjá Serflutningsskipan Landsins, kunnu venda sær til Heimarøktina í Eysturoy, sum húsast á Heilsumiðstøðini í Runavík, tlf. 449249.

Ringjast kann á skrivstovuna hjá Heimarøktini, mánadag til fríggjadag frá kl. 08-13.